# B36 MÁLAÐI HAVNINA HVÍTA

**Seinasta korterið trillar B36 bóltin runt í besta Barcelona stíli, meðan áskoðararnir rópa, at HB er eitt tekniseriu lið**

**FÓTBÓLTUR** Við einum sannførandi 4-1 sigri á grannunum úr HB, málaði B36 í gjár Havnina hvíta. Hóast HB kom á odda í fyrra hálvleiki, so var B36 omaná tað mesta av dystinum og vann uppiborðið. Sjáldan hevur B36 verið so greitt omaná í eini grannauppgerð og liggur framvegis fremst í Vodafonedeildini

Tróndur Arge – Gundadalur

| | |
|---|---|
| B36 | 4 |
| HB | 1 |




*Róaldur Jacobsen hevur júst stúta útjavnandi málið í kassan*

Mynd: Álvur Haraldsen

Á miðjum vølli vinnur Heini í Skorini bóltin og setur kós móti HB hálvuni í vinstru. Við einum 1-2 samanspæli kemur hann í góða støðu og leggur bóltin fyri føturnar á Róaldi Jacobsen. Róligi maðurin við tíggjutalinum á rygginum leggur bóltin til rættis uttan fyri brotsteigin; og úrslitið er givið. Við einum frálíkum skoti leggur hann B36 á odda 2-1, og ongin í Gundadali er í iva um, hvør vinnur fyrstu grannauppgerðina í ár. Málið lýsti væl B36 liðið í gjár. Stríðsviljin at vinna nærdystirnar, skilagóða spælið og evnini at umseta møguleikar til mál.

### B36 best frá byrjan, men HB skorar

Longu aftan á fimm minuttir hevði Jákup á Borg eitt skot á stongina. Løtu seinni rakti Símun Joensen tvørstongina. Fyri uttan eina møguleikan, tá Símun Samuelsen kom at standa leysur, so sat B36 á øllum. Deyðbóltarnir hjá Súna Olsen settu HB verjuna, ið hevði nokk við at temja Jákup á Borg og Lukasz Cieslewicz, upp á yvirarbeiði. Tað var eftir ein av deyðbóltunum hjá Súna, at HB málverjin, Heðin Stenberg, setti eitt HB álop í gongd. Bólturin var rullaður út til Pætur Jørgensen í høgru. Inni á egnari hálvu sendi hann ein langan bólt uppum B36 verjuna til ein púra leysan Jón Krosslá Poulsen, sum tamdi bóltin og meddaði til. Eitt gott mál, men helst eru Mikkjal Thomasen og John Petersen ikki nøgtir við verjuna í hesum føri.

### B36 javnar

Eftir málið er lítið veiggj í B36, sum tykist hava mist takið á dystinum, meðan HB luktar blóð. Bæði Jákup á Borg og serliga Lukasz Cieslewicz detta eisini úr dystinum. Men fimm minuttir fyri hálvleiki eru teir báðir orsøkin til at Róaldur Jacobsen kann stúta B36 á máltalvuna. Lukasz Cieslewicz sendur eina frálíka sending upp á tvørs av vøllinum til Jákup á Borg, sum er staddur í høgrabori. Við vinstra beini finnur hann Róald Jacobsen í brotsteiginum, sum við høvdinum javnar fyri B36. Tá farið verður til hálvleiks er B36 omaná, og tað merkist eisini á viðhaldsfólkunum hjá B36, sum halda nógvan gang.

### Róaldur málar Havnina hvíta

Í seinna hálvleiki eru teir hvítu aftur omaná og flótandi álopsspælið skapar HB liðnum nógvar trupulleikar. B36 miðvøllurin, við John Hansen og Heina í Skorini á odda, megnar at basa skapandi partinum av HB miðvøllinum og samstundis seta gongd á mótálopini. Tað er eisini eftir tvídyst á miðvøllinum, at Heini í Skorini setur gongd á álopið, ið endaði við at Róaldur Jacobsen leggur B36 á odda. Eftir málið royna verandi føroyameistararnir at skifta álopskent inn, men í at kalla somu løtu verður Lukasz Cieslewicz felldur í brotsteiginum, og dómarin